# Maxim-kokkur við Tjaldrinum



Hendan dagin, vit tóku myndir av Signari Haraldsen, kokkaðist hann umborð á Brimli, sum lá við vestaru bryggju í Havn. Mynd: Vilmund Jacobsen

**Sum 17 ára gamal fór hann í læru sum hotell-og restaurationskokkur á Hotel Borg. Tá hotellið fór av knóranum, gjørdi hann seg lidnan við læruna á matstovuni Maxim í Alberts Hall á Argjum. Seinastu árini hevur hann verið fastur kokkur umborð á vaktar-og bjargingarskipinum Tjaldrinum**

## Umborð



**Vilmund Jacobsen**
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo

Signar Haraldsen er vestmenningur, 37 ára gamal. Hann er fastur kokkur umborð á vaktar-og bjargingarskipinum Tjaldrinum.

Tveir kokkar eru knýttir at skipinum, ein er umborð hvønn túrin. Hin kokkurin er vágbingurin, Harry Jacobsen, sum hevur siglt við Tjaldrinum øll árini, síðan skipið kom – í 32 ár tilsamans.

Harry fyllir 67 í mai. Hendan túrin er hann í landi, nú Signar er umborð, men næsti túrur, sum byrjar í dag, verður hin seinasti hjá honum. Tá Harry kemur í land aftur um 14 dagar, gevst hann at sigla og fer í land við pensjón.

Harry Jacobsen og Eyðbjørn Lervig úr Leirvík hava siglt við Tjaldrinum heilt síðan fyrsta dag.

Signar Haraldsen, sum er útbúgvin hotell-og resturatiónskokkur, byrjaði at sigla fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna í 1997. Ólavur Halgi var seldur, og Nim varð leigaður til at røkja vaktarhald og bjarging saman við Tjaldrinum.

- Eg var fyrst umborð á Nim og síðan við Gorm, ið eisini var eitt vaktar-og bjargingarskip, sum stovnurin leigaði úr Danmark.

Í ár 2002 fór Signar umborð á Tjaldrið, og har hevur hann verið øll árini síðan. Onkran túr hevur hann loyst av umborð á Brimli, og tað var her, vit hittu hann fyrstu ferð fyri nøkrum mánaðum síðan. Tað er eisini haðani, myndirnar á hesi síðuni eru.

11 mans eru við Tjaldrinum í senn, og 12 eru umborð á Brimli. Teir eru 14 dagar umborð í senn og 14 dagar í landi.

Hetta er ein góð skipan, halda teir, sum sigla við hesum skipum.

Nú vit vendu okkum aftur til Signar mikudagin í hesi vikuni, var hann umborð á Tjaldrinum, sum var á leiðini vestanfyri.

- Arbeiðsumstøðurnar hjá kokkinum eru góðar umborð á Tjaldrinum, men tær eru uppaftur betri umborð á Brimli. Maturin er hin sami. Mær dámar hetta sjólívið ógvuliga væl, men tað skerst ikki burtur, at tú onkuntíð spælir tær við tankan kanska at royna aðrar møguleikar.

Men hvussu bar tað so til, at Signar gjørdist hotell-og resturatiónskokkur?

- Tá eg var liðugur við 10. flokk, fór eg við Fram úr Vestmanna, sum var ein lutfalsliga lítil og gamal ísfiskatrolari. Vit partrolaðu saman við Vesturbúgvanum. Eg var við Fram í eitt ár ella so, og onkuntíð loysti eg kokkin av. Umborð á Fram var kokkurin eisini á dekkinum.

Hann sigur, at skiparin á Fram, Jákup á Rógvu og kokkurin á Hotel Borg, sum hotellið tá kallaðist, vóru svágrar, og Jákup eggjaði honum til at søkja á Hotel Borg.

Signar ringdi sjálvur til kokkin, og tað var eingin trupulleiki. Hann kundi koma í læru á hotellinum. Hetta var í 1988, tá hann fyri 20 árum síðan var 17 ára gamal.

- Tá vit vóru flestir, vóru vit átta lærlingar í køkinum á Hotel Borg. Samanhaldið var ógvuliga gott, og mær dámdi sera væl.

Tá Signar hevði eitt lítið ár eftir av lærutíðini, fór hotellið, sum so mangt annað í Føroyum fyrst í nítiárunum, av knóranum. Men tá var hann so heppin, at hann slapp út á matstovuna Maxim, sum var í Alberts Hall á Argjum, at gera seg lidnan við læruna.

- Eg gjørdist hotell-og resturatiónskokkur í 1992, og eftir hetta arbeiddi eg í umleið eitt ár á matstovuni Maxim.

Signar sigur, at honum dámdi eisini væl á Maxim, men ásannar, at tað gekk heldur trekt móti endanum, sum hann tekur til.

- Hetta var ein sera trupul tíð í meginpartinum av føroyska samfelagnum, leggur hann aftrat.

Av Maxim fór hann niðan aftur á sama hotell, har hann eini fimm ár frammanundan var byrjaður at læra.

- Nú átti Smyril Line hotellið. Nógv var broytt, og fólkini vóru ikki tey somu. Kortini dámdi mær væl, og eg var har tey næstu árini, til eg fór umborð á Norrønu sum kokkur á sumri í 1996.

Nú sigldi Signar við gomlu Norrønu um summarið og var eisini onkran cruice-túr við skipinum uttanfyri vanligu summar vertíðina.

- Um veturin var eg við øðrum skipum, og eg róði eisini út við báti úr Vestmanna.

Einar tveir túrar var hann soleiðis sum kokkur við rækjutrolaranum Margrethu uppi við Svalbard. Tað vóru nólsoyingar, sum áttu Margrethu.

Í einar tveir mánaðir tilsamans var Signar fyrsti kokkur við gomlu Norrønu. Tá var bara hovmeistarin yvir honum, men sum hann tekur til, so gjørdi hovmeistarin ikki mat.

- Mær dámdi væl at sigla sum kokkur við gomlu Norrønu, men eg havi ikki hugsað um at søkt ein slíkan kjans aftur, síðan eg fór at sigla við Tjaldrinum burtur av.

Signar Haraldsen sigur, at bátur var altíð í húsinum hjá teimum í Vestmanna, og sum heilt ungur dámdi honum væl at vera á floti, antin tað var við snøri ella við byrsu á fuglaveiði.

- Beiggi mín hevur eitt 8-mannafar, men nú eru túrarnir hjá mær á opnum báti ikki nógvir, leggur hann aftrat.



Signar hevur gjørt gullash til døgurða, og vit fingu eisini ein bita saman við manningini á Brimli. Mynd: Vilmund Jacobsen